# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio á Rás2**
*verður hósdagin kl. 17.10*



*John Zachariassen og Bogi Jacobsen frá ráðgevingarstovuni Munin við føroysku navigatiónsskipanini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Føroysk rødd í GPS-aranum

Nú kunnu vit bjóða teimum, sum koma til Føroyar at vitja eins og øllum føroyingum eina nýggja GPS-navigatiónsskipan við øllum Føroyakortinum, bæði til koyring á føroysku vegunum og til gongutúrar í haganum, siga Bogi Jacobsen og John Zachariassen frá ráðgevingarstovuni Munin í Havn, sum hava ment hesa skipan.

Vit royndarkoyrdu skipanina í Havnini við sera góðum úrsliti. Ymsar adressur í býnum vórðu tastaðar inn, og síðan vórðu vit vegleiddir av eini føroyskari rødd, sum segði okkum, um vit skuldu snara til høgru ella vinstru, og nær bilurin var komin til ta ávísu adressuna.

Talan er um eina framkomna GPS-skipan við nógvum møguleikum. Skipanin er gjørd til Garmin GPS-arar og føroyakortini kunnu keypast í radiohandlum og vera at fáa aðrastaðni við.

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin, eftir tíðindini kl. 17, verður skipanin royndarkoyrd saman við Boga Jacobsen og John Zachariassen frá ráðgevingarstovuni Munin.

**mg**

# Camping á Svangaskarði

B68 dagur verður á Svangaskarði leygardagin 20. juni við nógvum ymiskum tiltøkum.

Sum nakað nýtt, verður grasvøllurin á Svangaskarði tøkur til campingpláss alt vikuskiftið.

Kostnaðurin fyri campingpláss er kr. 120 um samdøgrið, og kostnaðurin fyri teltpláss er kr. 75 um samdøgrið. Tilmelding til campingpláss kann gerast við at ringja til Haldor Gaardbo tlf. 217760 ella 447760. Skráin fyri B68 dagin sæst á www.b68.fo

**mg**




*Tey, sum eru áhugað í at campera á grasvøllinum á Svangaskarði, kunnu seta seg í samband við Haldor Gaardbo*

# Reyni Service ve

Plátu- & Lakkverkstaðurin hjá Reyni Service í Hoyvík fekk fríggjadagin 12. juni sum tann fyrsti í Føroyum umhvørvisgóðkenning frá DuPont Refinish.

Í øllum Evropa eru umhvørviskrøvini frá ES til lakkering av bilum nógv herd, og tey verða enn strangari í 2010. Hetta hevur Reyni Service tikið í álvara, og longu nú lýkur plátu- & lakkverkstaðurin krøvini, sum koma í gildi næsta ár.

Tað er soleiðis, at í lakki eru organisk loysingarevni, sum lætt fordampa. Í hesum útlátinum eru nógv evni, sum bæði dálka luftina og eru skaðilig fyri fólk at anda í seg.

Fyri at verja umhvørvið og tryggja heilsuna hjá teimum sum lakkera bilarnar, hevur




plátu- & lakkverkstaðurin hjá Reyni Service í Hoyvík valt einans at lakkera bilar við góðkendum lakki frá DuPont Refinish.

Tað er LakGruppen í Danmark, ið umboðar DuPont, sum í Føroyum verður umboðað av Vøruhúsinum.

**mg**